# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Axel Mortensen, vanligur nevndur Akka, fer til gravar úr Vesturkirkjuni hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja lata blómur ella krans, kunnu lata Vesturkirkjuni eina gávu.

## Tøkk

Hjartaliga takk til øll tykkum, sum gjørdu mær 75 ára føðingardagin so hugnaligan. Takk fyri nógva góða hjálp, gávir og heilsanir.
Eini gleðilig jól í Jesu navnið.

**Heilsan**
**Fía Johannessen, Nes**

### Statsautoriseraður revisor



Jóhannes Færø stóð tann 23. november 2009 royndina sum statsautoriseraður revisor. Jóhannes er ættaður úr Klaksvík og er í dag 29 ára gamal. Hann byrjaði í 2000 at arbeiða sum grannskoðari hjá Rasmussen & Weihe í Tórshavn, og starvaðist har í tvey ár. Síðani fór hann í starv hjá altjóða grannskoðanarfyritøkuni PricewaterhouseCoopers í Keypmannahavn, har hann framvegis er í starvi. Í 2006 fekk hann prógv sum cand.merc.aud á handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

# MERKISDAGAR

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava Dagmar og Dávid Jacobsen, Norðagøtu silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbodnum á Hotel Føroyum 19. des.

**75 ára føðingardagur**
Marita Arge Magnussen, Tórshavn, verður 75 ár 18. des. Dagurin verður hildin leygardagin 19. des. í Sjónleikarahúsinum frá kl. 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 3. jan. verður Steingrim Joensen, Argjaboðagøta 32, Argir, 85 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum sunnudagin 3. jan frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# Sofus Poulsen á Kambsdali



*Sofus Poulsen við einum av málningunum sum verða á framsýningini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin 17. desember letur málningaframsýningin "Nýggjar leiðir" hjá Sofusi Poulsen upp í LM-Handlinum á Kambsdali.

Á framsýningini eru 10 málningar, sum eru máláðir í heyst. Myndevnini eru ymisk, og hóast litirnir eru ljósir, eru myrkir ravnar eitt gjøgnumgangandi tema í málningunum. Hóast framsýningin letur upp hósdagin, verður ferniseringin leygardagin.

Framsýninginum hjá Sofusi heldur fram til jólar. Opið er, tá LM-Handlilin er opin.

*-red*

Fyri 30 árum síðan:

# Stýrimenn í 1979



Í desember 1979 fingu stýrimenn prógv á Føroya Sjómansskúla. Teir vóru: Jacob D. Lagfoss, Sandvík, Heini H. Guttesen, Sørvágur, Anfinnur Gærdum, Strendur, Julian M. Juul, Tórshavn, Jørgen Kreisø, Gjógv, Jón Simonsen, Sandavágur, Kaj Tausen, Vágur, Oddmar H. Hansen, Tórshavn, Eyðfinnur Olsen, Tórshavn, og Dione Nolsøe, Sørvágur.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1980*